| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br>***Course number*** | 6747.24 |
| **Heiti**<br>***Title*** | Inkluderandi sernámsfrøði: Sosialkognitivt menningarórógv (adhd, autismuspektrumið, menningartarn)<br><br>Inclusive Special Needs Education: |
| **ECTS**<br>***ECTS*** | 7,5 ECTS |
| **Fortreytir**<br>***Prerequisites*** | Grundskeið í sernámsfrøði á støði við 7,5 ECTS og hava minst 2 ára starvsroyndir í fólkaskúla ella miðnám. Luttakarar á grundskeiðnum í sernámsfrøði 2024/2025 hava fyrsta rætt til luttøku. Um pláss eru tøk er møguleiki hjá øðrum at lutaka |
| **Stig**<br>***Level*** | Bachelor of Education (BEd.). |
| **Endamál**<br>***Purpose*** | Endamálið við skeiðnum er at gera tann lesandi føran fyri at meta um (1) sernámsfrøði sum hugtak, t.e. sum námsfrøðiliga sergrein og sum partur av almennu námsfrøðini (2) sernámsfrøði í verki, við sjóneykuni á ymiskar avbjóðingar, ið krevja sernámsfrøðiligt atlit (3) arbeiðshættir við denti á hættir at arbeiða við sernámsfrøðiligum avbjóðingum. |
| **Innihald**<br>***Content*** | Vísindaliga ásjónin, á skeiðnum, tekur støði í eini ástøðiligari tilgongd um formliga heilan og at heilin mennist í kontekstuellum viðurskiftum, ið eru knýtt at sosiala og relationella felagsskapinum og samspælinum. Ástøðiligi grundleisturin á skeiðnum, tekur sostætt støði í eini bio-psyko-sosialari vísindatilgongd.<br><br>Við støði í lýsta grundleistið, kemur skeiðið at fevna um:<br><br>o Gjøgnumgongd av stóru diagnsostisku bólkunum innan barna- og ungdómspsykiatriska økið. Her við serligum atliti til autismu, ADHD/ADD og menningartarn.<br><br>o Sernámsfrøði í verki: avbjóðingar, ið krevja sernámsfrøðilig atlit viðvíkjandi næmingum í:<br>    o Avbjóðandi læriumstøðum<br>    o Serligum sosialum umstøðum<br><br>o Arbeiðshættir: hættir at arbeiða við sernámsfrøðiligum avbjóðingum<br>    o Serundirvísing<br>    o Nægmingalagað undirvísing<br>    o Inkluderandi sernámsfrøði |

| | |
|---|---|
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>***Learning and teaching approaches*** | Vit nýta fyrilestraundirvísing, samstarvslæru, bólkaarbeiði, greining av casum, kjakbólkar, upplegg frá skeiðsluttakarum, stutt skrivlig avrik, sjálvlestur, osfr.. |
| **Læruúrtøka**<br>***Learning outcomes*** | Við skeiðslok skal tann lesandi megna at greiða frá, skyna ímillum, meta um/taka støðu til, kjakast og hugleiða um:<br>• sernámfrøði í verki við støði avbjóðingum í læriumstøðum, atferðarumstøðum og sosialum umstøðum, ið krevja sernámsfrøðiligt atlit.<br>• arbeiðshættum í sambandi við sernámsfrøðiligar avbjóðingar, t.d. serundirvísing, næmingalagað undirvísing og inkluderandi sernámsfrøði. |
| **Próvtøkuháttur**<br>***Assessment method*** | Próvtøkan er tvíbýtt<br>(1) Tey lesandi skulu arbeiða við sernámfrøðiligum avbjóðingum í skúlanum, meðan skeiðið gongur og dokumentera, hvussu tey hava skipað arbeiðið og samstarvið frá byrjan til enda. Hetta arbeiðið skal verða góðtikið av undirvísarunum, áðrenn endaliga uppgávan verður skrivað.<br>(2) Tey lesandi skulu skriva eina stutta akademiska uppgávu (7-10 blaðsíður), sum tekur støði í einum ella fleiri avbjóðingum, ið eru tengdar at sernámsfrøði í skúlanum. Teksturin skal leggjast fram munnliga. |
| **Próvdøming**<br>***Examination*** | Innanhýsis próvdøming |
| **Próvtalastigi**<br>*Marking scale* | Staðið/ikki staðið |
| **Lestrarlisti**<br>*Bibliography* | Bókmentalistin verður latin teimum lesandi, áðrenn skeiðið byrjar |
| **Ábyrgd**<br>*Contact* | Frida Poulsen (fridap@setur.fo)  / Anna Eikholm (annaei@setur.fo) |